# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Bumbið ikki skúlareformin

Tað er stórt spell, um tað kemur so vítt, at Føroya Lærarafelag fer at bumba skúlareformin hjá Helenu Dam á Neystabø, landsstýriskvinnu í skúlamálum, í knús. Men hesi hóttan kemur formaðurin í Føroya Lærarafelag við í Sosialinum í gjár.

Ætlanin hjá landsstýriskvinnuni gongur út uppá, at stórar sparingar skulu gerast á skúlaøkinum, eitt nú við at skipa landið í skúlaøki, har fleiri smærri skúlar verða lagdir saman fyri á tann hátt at spara nógvar lærarakreftir. Hetta er ein klók leið at ganga á skúlaøkinum: Ført verður javnan fram, at ein fyrimunur við hesum er, at børn í smáu skúlunum koma í eitt størri skúlaumhvørvi og njóta gott av øllum tí, sum tað hevur við sær. Skúlaverkið sparir nógvar pengar, tí læraralønirnar eru bróðurparturin av útreiðslunum - og við at flyta nemingar úr smáum skúlum í størri skúlar, so spara vit nógvar pengar, tí lærarakreftirnar vaksa ikki í sama lutfalli - ella at vit gera betri nyttu úr lærarakreftunum roknað á hvønn næming, um vit so mugu siga.

Føroya Lærarafelag hevur nú fingið ein illgruna. Formaður felagsins stólar ikki upp á landsstýrið - hóast hann heldur, at Helena Dam á Neystabø heilt vist hevur góðar ætlanir við sínum uppskoti, so stólar læraraformaðurin ikki upp á samgonguna - men misteinkir hana fyri at vilja spara pengar í skúlaverkinum. Tað var so ikki ætlanin. Tvørturímóti vóru intentiónirnar, at við at spara í skúlaverkinum á henda hátt, so skuldu pengar finnast til at fíggja onnur øki í skúlanum.

Vit skulu ikki siga formannin í Føroya Lærarafelag ringan fyri ikki at stóla upp á okkara kosnu menn og kvinnur. Arbeiði teirra er ikki júst álitisvekjandi, hóast tørvurin á skilagóðum politikki sjáldan hevur verið størri.

Vit kunnu so ikki annað enn vóna, at Føroya Lærarafelag og Mentamálaráðið og løgtingið sum so kunnu ganga hond í hond, soleiðis at rationaliseringar kunnu fíggja ein betri fólkaskúla. Øll vita, at tað fíggjarliga táttar í allastaðni. Men summi øki í samfelagnum hava serligan týdning - sum vit eiga at hjúkla serliga nógv um. Fólkaskúlin er eitt teirra.

**Sosialurin**

## Tjóðveldi og Skálafjarðartunnilin

**ALFRED OLSEN**
løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin



"Vit koma ikki at atkvøða fyri lógaruppskotinum um Skálafjarðartunnilin!"

So greið vóru orðini hjá framsøgukvinnuni hjá Tjóðveldinum í Útvarpinum á middegi mikudagin.

Hetta merkir, at stendur tað upp til Tjóðveldi, so fær P/F Skálafjarðartunnilin ikki loyvi til at gera tunnil millum eystara og vestara arm á Skálafjørðinum og suður til Suðurstreymoy.

**Tjóveldi skuffar**
Alment hevur verið víst á, at tann búskaparligi vinningurin av Skálafjarðartunlinum er 130 mió. kr. um árið, men hesum er Tjóðveldi ímóti, bara tí, at tað er eitt privat felag, sum skal gera tunnilin og reka hann, uttan at landið rindar eitt einasta oyra. Tá ið tunnilin er goldin, verður hann latin landinum fyri onki. Eg má siga eins og nógv fólk í dag, "Tjóðveldi skuffar okkum".

**P/F Skálafjarðartunnilin**
Eg taki hattin av fyri teimum persónum, sum føddu hugsanina um ein trísporaðan tunnil við rundkoyring, ið kom at binda Skálafjørðin saman við Suðurstreymoy, og sum hava lagt fram eitt so gjøgnumført projekt, sum ikki hevur sæð sín líka her á landi. Hesi fólk hava higartil brúkt milliónir upp á verkætlanina og eru til reiðar at gjøgnumføra hana, tí teir trúgva uppá tað.

**Niðurstøða**
Vit kunnu tó tíverri staðfesta, at Tjóðveldi tekur ikki undir við hesum einastandi privata initiativi úr Eysturoynni. Heldur vilja tey skjóta verkætlanina langt út í framtíðina, og tað er stórt spell.

Men so vita vit tað, bæði vit løgtingsfólk, eysturoyingar, norðingar og øll onnur, sum halda, at tað hevur stóran týdning, at Skálafjarðartunnilin kemur so skjótt sum møguligt til stórt gagn fyri okkum øll!

## Ikki neyðugt við nývali nú

**HEÐIN D. POULSEN**



Tað tykist sum um Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin vilja taka ábyrgd og taka neyðug stig fyri at betra um landsins fíggjarstøðu. Tað sær eisini út til, at Fólkaflokkurin, sum einasti samgonguflokkur, ikki klárar at fyrihalda seg til fíggjarliga veruleikan.

Fólkaflokkurin er pápi at øktu almennu útreiðslunum

Heldur enn at royna møguleikarnar, so velur Fólkaflokkurin – enn einaferð – at leggja somu plátuna á, sum teir hava spælt í 15 ár, um at tað almenna má spara. Hetta stendur í beinleiðis andsøgn við veruleikan, at tað er júst Fólkaflokkurin, sum tey seinastu 15 árini næstan óavbrotið hevur sitið í samgongu og verið garantur fyri, at almennu útreiðslurnar bara hava hækkað. Ongar rationaliseringar eru framdar av almenna sektorinum við Fólkaflokkinum, men hinvegin hevur Fólkaflokkurin skapt nýggjar almennar stovnar og økt almennu útreiðslurnar.

**Ein samgonguflokkur er í vegin**
Verandi samgonga kann ikki halda áfram, tað vil vera katastrofalt fyri búskapin. Løgmaður má taka ábyrgd og taka eina avgerð, ella endar hann í søgubókunum sum løgmaðurin, sum einki megnaði, annað enn at fyrigeva og hyggja, alt ímeðan búskapurin kollsigldi.

**Tjóðveldi inn – Fólkaflokkin út**
Sum eitt alternativ til nýval, kundi løgmaður roynt at skipa nýggja samgongu. Søguliga sæð, hevur tað altíð verið langt millum Sambandsflokkin og Tjóðveldi, men eftirsum kardinalpunktini í politiska landslagnum í løtuni ikki er fullveldi og samband, men búskapurin, átti løgmaður at roynt at skipa samgongu millum Tjóðveldi og møguliga Sjálvstýri, saman við Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum.

## »Ungdómur og vísdómur fylgjast sjáldan at«

**KATRIN DAHL**



Hetta orðatakið kom mær til hugs, tá eg í gjárkvøldið sá forsíðuna á Sosialinum, har felagið hjá fólkaflokksungdómi, sum kallar seg »Huxa«, meldar út við teirra meining um ta føroysku fólkakirkjuna.

Ein sera illa umhugsað útmelding.

Hoyrdi í danskari tíðindasending, at konservativ ungdom hevði havt landsfund og kom við somu útmelding, so helst er tað haðani, at felagið Huxa letur seg ávirka.

Ikki er tað alt, vit skulu slúka rátt, sum kemur úr Danmark, og slett ikki tá tað kemur til mentan og átrúna.

Tann føroyska fólkakirkjan hevur ígjøgnum øldir havt so ómetliga stóran týdning fyri tað føroyska fólkið og ta føroysku mentanina.

Rykkja vit teppið undan fólkakirkjuni, verður skaðin óbótaligur, mentalt, sosialt og menturnaliga.

Tí fari eg at mæla felagnum »Huxa« til:

Hugsið áðrenn tit tala.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Jaspur Langgaard jaspur@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.